## 646 næmingar fyrstu ferð í skúla

Sambært einum yvirliti frá Mentamálaráðnum fara 646 næmingar í 1. flokk í ár. Av hesum var Rebekka Syderbø á Húsum ein teirra. Av øðrum skúlum kring landið, har bert ein næmingur fer í 1. flokk er talan um hesar: Mykines, Kunoy, Leyvar/Válir, Tjørnuvík (myndin), Húsavík/Dalur, Skálavík, Fámjin og Hov. Í Hesti, Kirkju/ Hattarvík, Sandvík, Funningsfirði, Mikladali/Trøllanesi, Haraldsundi og í Haldórsvík fer eingin næmingur í 1. flokk í ár.



## Framhaldsdeild á Húsum

Skúlin á Húsum er skipaður soleiðis, at tilboð er til næmingarnar frá 1. flokki og allan vegin upp til og við 9. flokk. Tað seinasta skúlaárið kunnu børnini taka í næsta stórbýi, Klaksvík. Hóast skúlin hevur síni 120 ár á baki stendur hann einki aftanfyri aðrar skúlar í útgerð og lærdómi. Við so fáum næmingum ber betur til hjá lærarunum at veita hvørjum einstøkum næmingi júst ta undirvísingina, sum teimum er tørvur á. Gongdin og royndirnar hjá næmingunum og lærarum teirra vísa, at teir, tá á stendur, standa einki aftanfyri skúlafelagar sínar í teimum størru framhaldsdeildunum. Í skúlanum er eingin næmingur í 2. og 6. flokki, tríggir næmingar í 5. flokki og ein næmingur í 1., 3., 4., 7., 8. og 9. flokki.

# Gott at man

**Fyrrapartin byrjaði skúlagongdin aftur í Húsa/ Syðradals skúla. Millum næmingarnar í skúlanum er Rebekka Syderbø, sum tey komandi árini fer at bera heitið skúlanæmingur. – Eg eri spent at byrja í skúlanum, sigur Rebekka, sum er einasti næmingurin í 1. flokki**



*- Mær dámar best teldur, sigur nýggi næmingurin í Húsa skúla, Rebekka Syderbø*



*Benjamin og Pætur hava okkurt at spyrja um viðvíkjandi tímatalvuni, og svarar Sára Mikladal spurningum teirra*

SKÚLAGONGD

*Orð&myndir: Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Húsar:** Klokkan er ikki meiri enn farin stórt av hálvgum níggju, tá teir fyrstu næmingarnir koma inn í einastu stovuna her í Húsa skúla.

Tveir smádreingir kaga innar, og spyrja um lærarin er komin aftur. Teir hava helst ikki gáað um klokkuna, men vóru í aðrar mátar fyrireikaðir og spentir uppá fyrsta skúladag eftir summarsteðgin.

Teir høvdu, fyri løtu síðani, sæð lærara teirra, Sáru Mikladal fara út úr skúlanum eini ørindi, men vildu bara kanna eftir, um teir skuldu koma inn nú, ella um teir kundu spæla uttandura eina løtu aftrat.

Nei, tað er góð tíð enn til næmingarnir skulu møta. Skjótir fóru teir til dørs aftur.

Tað gekk ikki long løta aftrat, fyrrenn málageipan hoyrast í gongini. Hesaferð eru tað tvey foreldur, sum koma við yngsta næmingi teirra, og sum í dag fer undir skúlatíðina – hvat hon so man fara at menna seg til.

Í gongdini dagar nú ein smágenta fram. Hárið er purlut, klæðini eru rein og fín, og á rygginum ber hon eina skúlatasku, ið til høvið er keypt heilt úti í Runavík.

Nú byrjar álvarin í hennara barnalívi, og nú verða tað teir tríggir lærararnir við skúlan sum fara at fáa eitt avgerandi orð at siga og læra.

Júst hetta tykist kortini ikki nerva ta ungu og lívsfrísku Rebekku. Stillisliga setir hon seg undir liðini á Ásu á fremsta beinki, vinstrumegin læraran.

- Tað er gott at hava eina gentu at spæla við, sigur Rebekka.

Alt hetta við spælinum má kortini bíða til í morgin. Hesin skúladagurin verður stuttur og konsentreraður, neyvan stórt longur enn ein tími.

### Telefonboð

Tað hevur verið spenningur í luftini hesar seinastu dagarnar á Húsum. Teir níggju næmingarnir í Húsa skúla hava veruliga sæð fram til henda mánadagin 18. august.

Eftir eina drúgva summarferiu rann dagurin umsíður upp, tá skúlagongdin skuldi byrja aftur: Nú skal skil koma á gerandisdagin, songartíðin fáast uppá pláss og skúlin gerast hann, ið fær størstu tíðina í gerandisdegnum.

Í bløðum og útvarpi hava lýsingar hesa seinastu tíðina verið at hoyrt frá teimum ymisku og størru skúlunum um, nær næmingarnir í teimum ymisku flokkunum skuldu møta aftur.

Lítil ivi man hava verið um, at børn og foreldur teirra hava sitið við spenningi frammanfyri útvarpstólið og lurtað eftir, nær teirra skúli skuldi byrja.

Soleiðis var kortini ikki á Húsum, tí her sótu børnini ístaðin og bíðaðu eftir at telefonin skuldi ringja heima við hús.

Her á Kalsoynni eru umstøðurnar av heilt øðrum slagi enn í einum av størru býunum ella bygdunum kring landið: Her er talan um ein lítlan bygdarskúla, næmingarnir eru fáir og øll vita tí, hvør fer í skúla og hvør eigur hvønn.

Hjá Sáru Mikladal var tí ikki neyðugt at gera annað, enn at ringja boðini runt. So vistu øll, nær skúlin skuldi byrja.

Boðini ljóðaðu nøkurlunda soleiðis: "Skúlagongdin byrjar aftur mánamorgunin. Allir teir 9 næmingarnir møta klokkan 9!"

### Lærarin kann skúlatingini

Í góðveðrinum í morgun møttu so allir tann káti skúlaungdómurin á Húsum til sín fyrsta skúladag í bygdarskúlanum frá 1888.

Veðrið var av tí allar fagrasta, og tað var tí neyvan uttan orsøk at hugsanin hjá næmingunum eisini var vend ímóti fótbóltsvøllinum beint við skúlan. Ein slíkur dagur má ikki fara aftur við borðinum uttan nøkur skot á grøna undirlagnum.

Alt meðan hugsanin leitar oman á vøllin, kemur Sára inn í skúlastovuna og brýtur líkasum hesa hugsan av, tí nú skal álvarin á tímatalvuna. Fyrsti skúladagur er nú einaferð fyrsti skúladagur.

Teir sjey dreingirnir hava brúkt hesa løtuna at gera sínar viðmerkingar til tað at fara í skúla. Onkur teirra gleðir seg at byrja aftur, meðan onkur annar – tja, hatar skúlan og heldur tað ikki vera "skeg" at byrja aftur. Orsøkin til at tað ikki er skeg at fara í skúla er hin einfalda, at tað er bara ikki skeg!

Teir eru eisini vitandi um,